# Avgerðin fellur í dag

**Tað er langt síðani, at landskappingin í flogbólti hjá monnum, hevur verið so spennandi sum hon er í ár. Tvey lið bjóða upp á meistaraheitið og sjálvt um Fleyr stendur við bestu kortunum, ræður um at spæla tey rætt**

FLOGBÓLTUR - MENN
*Sveinur Tróndarson*

Kappingarárið í flogbólti endar í dag. Hjá monnunum fellur avgerðin um sjálvt meistaraheitið í dag og sigast má, at teir sum hava lagt kappingina hava havt eina stak hepna hond í so máta. Tað er nevniliga ikki á hvørjum ári at tað hendir, men tað er so nógv meira áhugavert og nógv meira spennandi tá kappingin endar upp á henda mátan.

Tað er ikki vist, at vit fáa Fleyr leikararnar at taka undir við tí vit siga, men fyri okkum uttanveltaðu er tað í hvussu er galdandi.

Sum sagt aðrastaðni er tað Fleyr sum stendur við bestu kortunum í dag. Teir eru tað eina stigið framman fyri Mjølnir og havandi í huga gongdina hjá liðunum seinastu nógvu mánaðirnar, er lítið at siga til, at Fleyr er favorittur.

Tí tað er júst tað teir eru. Eingin kann taka favorittheitið frá Fleyr, tí sum oddalið eiga teir at kunna vinna dystin móti botnliðnum, men tá meistaraheitið stendur upp á spæl, kunnu nervarnir gera sítt, og tá ein – sum Mjølnir – sleppur at gera av, um arvafíggindarnir úr Fleyr skulu vinna meistaraheitið, stendur æran upp á spæl, og tí skal ein ikki kimsa at.

### Broytt oddalið

Tað var ikki fyrr enn móti endanum av fyrru hálvu, at Fleyr fór at røra upp á seg í landskappingini. Tað gekk sera striltið at fáa skil á venjingina og á spælið, og tað sjálvt um liðið hevði gjørt íløgu í ein útlendskan venjara.

Hesin var tó ikki so drúgvur her á landi og tá hann var farin, tók Jan Hentze yvir, og tá sá út til, at leikararnir kendur seg aftur. Spælið broyttist og liðið fór alt í einum at bíta frá sær. Tá liðini fóru í jólafrí lógu teir á øðrum plássi.

Í seinnu hálvu hevur eingin veruliga staðið teimum kurl, og tað er sjálvsagt orsøkin til, at Fleyr nú stendur við bestu atgongumerkjunum til FM-heitið.

Mjølnir hevur harafturímóti havt eitt keðiligt ár. Byrjanin tók tey flestu á bóli, tí roknað varð við, at klaksvíkingar skuldu fara at liggja í tyngra endanum. Tað gjørdu teir ikki í byrjanini, men nú kappingin er liðug, eru teir aftast.

Men far ikki skeivur, tí sjálvt um Mjølnir liggur aftast, er ikki vist, at teir ikki kunnu taka stig frá Fleyr, tí í so máta hevur hetta kappingarárið víst seg at vera eitt løgið ár. ÍF lá við halanum í vatnskorpuni, men við eitt vekk fóru teir at vinna frá hond, og var tað ikki fyri skaðar og annað minni gott, høvdu teir helst fingið eitt orð at skula sagt í Eysturskúl-anum í dag.

### Fuglfirðingar skerdir

Tað fáa teir neyvan tí við ongum Boban og ongum Bartali á liðnum eru útlitini til sigur, meira enn kám. Ikki kann roknast við, at teir ungu menninir, sum tó hava víst, at teir kunnu bíta frá sær. Hetta kemur sjálvandi Fram til fyrimunar, men tað er ivasamt um ÍF hevði klárað at gjørt nakað við Fram kortini.

Fram hevur nevniliga havt serstakliga gott tak á ÍF, og teir hava dugað sera væl at brúka allan vøllin í dystunum móti ÍF. Hetta hevur gjørt, at ÍF ikki hevur vitað, hvar teir skulu verja seg, og tá er vandin fyri ósigri størri.

Í dag er vandin fyri ósigri til ÍF sera stórur. Einki er at ivast í, at Fram fer eftir sínum kjansi fyri at vinna FM, men spurningurin er, um tað røkkur.

Fleyr stendur við bestu kortunum, men teir fáa bara tann eina møguleikan afturat, og so kann tað gera tað sama, hvør verður við á vøllinum. Kravið er ein sigur ...

Dystirnir í meistaradeildini hjá monnum í dag, eru annars hesir:

Báðir dystirnir vera í Havn og báðir byrja klokkan 15.00. Fleyr og Mjølnir spæla í Gundadalshøllini, meðan Fram og ÍF spæla í auluni í Eysturskúlanum.

# Avgerðin um bronsuna fellur á Giljanesi

**Gullið endaði á Tvøroyri og silvurið í Klaksvík. Einasti spurningur, sum er eftir at greiða er, um bronsan skal til Fuglafjarðar ella um hon skal vestur í Vágar. Dráttur og ÍF hittast á Giljanesi í dag**

FLOGBÓLTUR - KVINNUR
*Sveinur Tróndarson*

Tað syndrið, sum er eftir av spenningi í landskappingini hjá kvinnum, snýr seg um, hvørt tað skal vera Dráttur ella ÍF, sum skal vinna bronsuna. Í sær sjálvum ikki nógv at stríðast um á seinasta leikdegi á árinum, men fyri hesi bæði liðini hevur tað stóran týdning um tey enda sum nummar trý ella sum nummar fýra.

Tað er meistaraliðið frá í fjør, sum fer á vøllin sum heimalið í dag. Dráttur megnaði í fjør fyri fyrstu ferð nakrantíð at vinna meistaradeildina hjá kvinnum, og tað var eitt ordans hál. Í ár hevur haraftur ímóti ikki gingið so væl í hond, men veruleikin er samstundis, at meistararnir hava mist fleiri av grundstuðlunum síðani kappingarárið í fjør endaði, og tá eitt lið missir fleiri landsliðsleikarar, ber ikki bøtur.

Tað sæst á spælinum, og í so máta hevur Dráttur ikki verið nakað undantak.

Tá tað er sagt, skal leggjast afturat, at Dráttur eigur gott fólk at seta við, og tað er at vóna, at hetta verður gjørt, soleiðis at liðið næsta ár verður ført fyri at taka av teimum avbjóðingum, sum liggja í meistaradeildini.

Fyribils er tað tó dysturin móti ÍF – um bronsuna – sum skal avgerðast.

Gestirnir í Fuglafirði komu eitt sindur tvørir inn í hetta kappingarárið. Tað er ikki óhugsandi, at tær hava havt tað sum Jeppi, tá hann vaknaði í songini hjá baróninum, tí í fyrsta dystinum móti Mjølnir – á útivølli – gjørdi ÍF nevniliga tað bragd at vinna 3-2 í Klaksvík.

Hetta úrslitið var óvæntað, men tað segði okkum, at ÍF er um at vera komið á beint við kvinnuflogbóltinum. Eingin skal ivast í, at leikaratilfarið er til staðar, men tað er ein spurningur, um felagið fær tað burtur úr teimum ymsu leikarunum, sum tað eigur. Onkuntíð hava tær lyndi til at gloyma at sláa, og tað ber ikki til, tá liðið hinumegin smekkar bóltarnar yvir um aftur.

Dráttur og ÍF standa rímuliga væl til hvørt annað, og tí er lítið at ivast í, at áskoðararnir, sum fara inn á Nes, fáa ein fínan flogbóltsdyst. So er bara at vóna, at áskoðararnir vera nógvir í tali.

Seinni dysturin í kvinnudeildini í dag, verður millum Fleyr og Mjølnir. Hesin dystur er so fullkomiliga og aldeilis týdningarleysur. Mjølnir hevur vunnið silvur, meðan Fleyr undir øllum umstøðum endar aftast, og tí er hetta bara ein avgreiðsluspurningur.

Dystirnir í deildini eru annars hesir:

Fleyr og Mjølnir hittast í Gundadalshøllini og tann dysturin byrjar klokkan 13.00. Klokkan 14 spæla Dráttur og Fleyr og tann dysturin verður í høllini á Giljanesi.

# – Teir fáa einki forerandi

**Mjølnir hevur ikki ætlanir um at lata arvafíggindanum úr Havn fáa meistaraheitið uttan at teir stríðast fyri tí. – Fyri okkum hevur tað stóran týdning at enda væl, sigur Trygvi Poulsen, veteranur á Mjølnir, sum aftur verður at síggja á sínum gamla plássi**

FLOGBÓLTUR - MENN
*Sveinur Tróndarson*

Tað hevði verið synd at sagt, at hetta kappingarárið hevur verið eitt av teimum góðu hjá Mjølnir. Í byrjanini lógu teir rímuliga væl fyri, men nú bara eitt vikuskiftið er eftir av landskappingini, eru teir langt aftastir.

Tað eru boð um broyttar tíðir í flogbóltshøpi í Klaksvík, og hetta er helst tann tungi veruleikin. Tá hetta kappingarárið er av, eru liðin fýra ár síðani Mjølnir seinast vann FM-heitið í mansdeildini, og kenna vit klaksvíkingarnar rætt, høvdu teir fegnir vilja ligið fremstir í deildini.

Soleiðis er støðan bara ikki og tí mugu teir taka til takkar við teirra leikluti, sum tað liðið, sum sleppur at gera av, hvør skal hava klørnar í FM-steypið.

Støðan undan dystinum er tann, at Fleyr liggur best fyri, og í fleiri vikur hava vit útbasunerað, at tað eigur ikki at henda, at Fleyr tapir móti Mjølnir í dag, og tað ætla Mjølnirleikararnir at mótprógva fyri okkum.

– Leikararnir eru øgiliga uppsettir. Okkara kappingarár er langt síðani yvirstaðið av tí at tað hevur gingið so av skriðuni, og tí er tað eyka stuttligt, at vit kunnu fáa avgerðandi leiklut á, hvør vinnur meistaraheitið. Hetta vita spælararnir og tí eru teir øgiliga spentir og uppsettir, sigur Trygvi Poulsen, ein av veteranunum á Mjølnir liðnum.

Trygvi hevur verið við Mjølnir í nógv harrans ár og hann hevur verið ein av teimum allar drúgvastu øll árini. Soleiðis hevur tó ikki verið í ár, tí hann hevur verið darvaður av skaðum, og tað hevur merkt, at hann ikki hevur leikt á vanliga plássi sínum á miðjuni, og tað hevur eisini verið til at sæð á spælinum hjá Mjølnir. Men hvussu verður so í dag.

– Eg royndi í dystinum móti ÍF at fara aftur á mítt vanliga pláss á miðjuni, og tað verður helst har eg spæli leygardagin, sigur Trygvi, sum leggur afturat, at Mjølnir sostatt er fullmannað, tá teir koma til Havnar at gera Fleyr fortreð ...

Um tað fer at eydnast torir hann ikki at siga nakað um. Hann veir bara, at hansara leikarar hava brúk fyri einum virðiligum enda upp á hetta kappingarárið. Bæði tí at tað hevur týdning fyri fyrireikingarnar til næsta kappingarár, og tí at tað bara er stuttligt at sleppa at spæla Fleyr eitt puss.

– Vit kláraðu okkum so mikið væl í fyrra dystinum í Havn, sum vit vunnu, so tað er ikki óhugsandi, at vit gera tað aftur, sigur Trygvi, sum staðfestir, at hansara leikarar fara á vøllin fyri at gera tað ítarsta.

At enda spurdu vit Trygva, hvønn hann helst vil hava skal gerast meistari.

– Fyri meg kann tað vera líkamikið tá vit sjálvir ikki kunnu gerast meistarar. Vit skulu spæla móti Fleyr og vit hava sett í okkum, at teir einki skulu hava forerandi og støðan hevði verið júst tann sama, um tað var Fram vit spældu ímóti, sigur Trygvi.



# Seinasti kjansur

**Í dag fáa vit at vita, um tað fer at eydnast Fleyr at vinna FM-heitið, ella um tað fer at eydnast Fram at stjala gullið fyri nøsini á teimum. – Vit eru til dystin fús, sigur Jan Hentze, venjari hjá Fleyr, sum er greiður yvir, at teir eru stórfavorittar til sigurin**

FLOGBÓLTUR - MENN
*Sveinur Tróndarson*

Tey fimm liðini hava kappast í seks mánaðir ella har á leið, og so verður alt avgjørt seinasta leygardagin í kappingarárinum. Tað kundi ikki verið betri lagt til rættis, og slett ikki, tá hugsað verður um, at avgerðandi dystirnir báðir, verða leiktir innan fyri ein kilometur. Í Gunda-dalshøllini og í auluni í Eysturskúlanum.

Tað er lítið at ivast í, at tað verður nógv virksemi í og uttan fyri hallirnar báðar í Havn seinnapartin. Fleyr og Fram hava kappast í alt ár um hetta vælsignaða meistaraheitið, og nú bara nakrir heilt fáir tímar eru eftir, standa teir meira ella minni og togtogast um steypið. Skal tað niðan í Gundadalshøllina ella skal tað oman í Eysturskúlan.

Tað er Fleyr, sum hevur bestu kortini á hondini og á pappírinum eru tað eisini teir, sum hava léttasta dystin at spæla. Rætt er helst, at Mjølnir er léttari mótstøða enn ÍF tá liðini eru fullmannaði, men veruleikin er, at Fram helst fær ein væl léttari dyst enn teir áttu at fingið í dag. Vist er í øllum førum, at Boban Ilic hjá ÍF ikki verður við, og ivasamt er, um Bartal Eliasen verður tøkur. Fótbólturin er aftur farin á rull, og er kavin so mikið burtur at tað verður spælt, verður hann helst at finna har í staðin.

Tí er uppgávan hjá Fleyr helst munandi trupulari enn uppgávan hjá Fram. Mjølnir kemur undir øllum umstøðum til Havnar við sterkastu manning, og tí fáa Jan og hansara menn ein skarpan gang tá teir skulu toyggja seg eftir FM-steypinum.

Men alt hetta er Jan Hentze greiður yvir, og hann góðtekur, vegna liðið, leiklutin.

– Vit mugu vísa, at vit kunnu vinna dystin. Tað er einki at ivast í, at vit eru favorittar, og tá vit hava gongdina hjá okkum í huga, mugu vit bara góðtaka at so er, sigur hann.

Men tað merkir tó ikki, at hann væntar, at Fleyr fær ein léttan sigur. Hann er nevniliga fullvísur í, at klaksvíkingar koma í Gundadalshøllina við tí málsetningi, at gera alt fyri, at Fleyr ikki vinnur dystin, og tí er tað upp til Fleyr at vinna dystin.



*Fleyr er stórfavorittur til dystin móti Mjølni, men hjá oddaliðnum taka teir einki fyri givið, nú gomlu arvafíggindarnir standa hinumegin netið*

– Tað var eisini orsøkin til, at vit fegnir vildu vinna dystin móti SÍ seinasta vikuskiftið, tí so lá einki trýst á okkum til henda seinasta dystin. Vit taptu og tí hava vit alt trýstið á okkum nú og tað mugu vit góðtaka, sigur Jan, sum tó heldur, at manningin á Fleyr liðnum hevur nóg drúgvar royndir til sjálvir at kunna avgerða meistaraheitið.

– Vit hava nógvar royndar menn og tað eigur at geva okkum ein fyrimun. Hinvegin hava ungu menninir eisini roynst stak væl í ár, og tað kann gera sítt til, at teir spæla uttan nervar. Vit fara í hvussu er at gera okkara til at vinna, sigur hann.

Fleyr liðið, sum fer á vøllin í dag, er ikki heilt tað sama, sum væntað var. Vit høvdu roknað við, at Steinar Eirikstoft, sum gongur í skúla í Danmark, fór at koma heim til henda dystin, men tað kemur hann ikki. Hann er úti og ferðast við skúlanum og tí er hann ikki tøkur fyri Fleyr. Tað vil siga, at Jóannes Eidesgaard fer inn á miðjuna at spæla meðan Bergur Olsen fer á diagonalin. Um hetta er nóg mikið, ja, tað fáa vit at síggja seinnapartin í dag.

# Fram liggur framvið

**–– Vit ætla okkum at gera okkara til, at trýstið á Fleyr verður so stórt sum tilber, sigur Rúni Weihe, liðskipari hjá Fram. ÍF harafturímóti, kemur við einum skerdum liði til Havnar, og tí fær Fram helst léttari spæl enn væntað**

FLOGBÓLTUR - MENN
*Sveinur Tróndarson*

Gongur alt eftir vild hjá Fram, standa teir sum Føroyameistarar seint seinnapartin í dag. Men so skal eisini ganga væl í hond. Mjølnir skal vinna á Fleyr í Gundadalshøllini meðan Fram skal vinna á ÍF í Eysturskúlanum.

Sjálvt um ÍF hevur gjørt nógv løgið í seinna parti av landskappingini er tað helst at krevja ov nógv, at teir skulu vinna á Fram í dag, tí kappingarárið hjá fuglfirðingum er liðugt og farið afturum.

Liðskiparin hjá Fram heldur eisini, at tað fyri so vítt kann gera tað sama, hvussu ÍF liðið er mannað, tí Fram hevur havt serstakliga gott tak á ÍF í ár. Fram er nevniliga einasta liðið, sum ongan dyst hevur tapt móti ÍF í landskappingini í ár.

– Vit hava havt serstakliga gott tak á teimum, bæði úti og heima. Tí eru vit betri fyri enn teir eru, sigur Rúni og leggur afturat, at teir hava spælt ÍF upp á rættan máta.

Liðskiparin hjá ÌF, Bartal Eliasen, staðfestir beinanvegin, at vinnur ÍF dystin í Havn leygardagin, so verður hann meira enn bilsin. Líkamikið um liðið vinnur ella tapur, vera teir verandi á fjórðaplássi, og tað hevur nevniliga fingið ta avleiðing, at venjarin, Boban Ilic, als ikki verður við á liðnum. Hann fer vestur í Vágar, har kvinnurnar skulu stríðast fyri at fáa bronsuna til høldar og tá Boban er venjari hjá báðum liðum, hevur hann valt at fara vestureftir.

Hendan avgerðin er ikki so løgin og tað er avgerðin hjá Bartali heldur ikki. Verður veður til fótbólt, verður hann nevniliga heldur ikki við, tí hann er nú farin undri kappingarárið í fótbólti, sum stendur fyri durum.

– At hvørgin okkara ikki verður við merkir bara, at liðið er so mikið veikari, og tað viknar bara uppaftur meira av, at onkrir aðrir leikarar eisini eru uttan fyri við skaða, sigur Bartal, sum tí ikki roknar við øðrum enn einum ósigri í Havn.

Tekur Bartal dystin stilt og róliga, er synd at siga, at havnarmenninir gera tað sama. Teimum stendur í boði at gerast meistarar um Fleyr snávar móti Mjølnir, og henda møguleika ætla teir ikki at lata fara aftur við borðinum. Tí fyri einum mánaði síðani sá ikki ein gang út til, at teir fóru at fáa henda møguleikan.

– Nei, tá sá einki út, men vit mugu siga, at vit hava verið meira enn hepnir. Alt er fallið út júst sum vit vildu hava tað, og tað vildu vit fegnir havt tað at gjørt einaferð enn, sigur Rúni og flennir.

Spurdur um spenningurin merkist á leikarunum, sigur hann, at tað ger hann. Men tað sæst ikki á spælinum. Menn eru spentir og tað er serliga tí, at hetta er seinasta umfar. Hetta er einasti og seinasti møguleiki, sum er eftir og tí hava vit eitt at gera.

– Vit skulu vinna okkara dyst og so mugu vit bara vóna, at Mjølnir vinnur á Fleyr, og eg veit, at Mjølnir fer at geva alt tað teir eiga. Men tað sigur seg sjálvt, at tað er spennandi upp á henda mátan, sigur Rúni.

Hann greiðir frá, at hetta er fyrsta árið, síðani hann byrjaði, at kappingin hevur verið so spennandi, at tvey lið kunnu gerast meistarar á seinasta leikdegi. Og hann heldur hetta vera nógv betri enn tá teir vunnu meistaraheitið fyri nøkrum árum síðani.

– Sjálvandi er tað mest spennandi at vinna sjálvur, men mátin sum vit vunnu upp á var einki spennandi fyri kappingina. Vit vóru meistarar fleiri vikur áðrenn kappingin endaði og samanborið við tað er hetta nógv betri sigur Rúni.

Hann leggur afturat, at Fram hevur roynt at økja um trýstið á Fleyr seinastu dagarnar. Liðini hava spælt onkrar venjingardystir og hesar hevur Fram vunnið. Teir hava trýst Fleyr av beráddum huga, júst fyri at økja trýstið á teir.

So verður bara spennandi at síggja um tað fer at hjálpa...

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 16 | 15 | - | 1 | 46 | 11 | 35 | 23 |
| 2 Mjølnir | 15 | 10 | - | 5 | 35 | 22 | 13 | 15 |
| 3 ÍF | 15 | 5 | - | 10 | 23 | 36 | -13 | 7 |
| 4 Dráttur | 15 | 5 | - | 10 | 27 | 34 | -7 | 6 |
| 5 Fleyr | 15 | 3 | - | 12 | 13 | 41 | -28 | 5 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fleyr | 15 | 10 | - | 5 | 36 | 25 | 11 | 15 |
| 2 SÍ | 16 | 10 | - | 6 | 38 | 24 | 14 | 14 |
| 3 Fram | 15 | 10 | - | 5 | 36 | 25 | 11 | 14 |
| 4 ÍF | 15 | 5 | - | 10 | 22 | 37 | -15 | 10 |
| 5 Mjølnir | 15 | 3 | - | 12 | 18 | 39 | -21 | 3 |